# Húsalandsgrunnurin í miðdepilinum

**Frágreiðingin um alternativa bústaðarbygging kom í tingið í gjár. Eitt av mongu umrøddu evnunum var framtíðin hjá Húsalánsgrunninum. Landsstýrismaðurin ætlar at nýta ein endurskipaðan Húsalánsgrunn til at fíggja alternativari bústaðarbygging, men serliga Fólkflokkurin gav til kennar, at tað vóru teir ikki so fegnir um**

FRAMTÍÐIN HJÁ HÚSALÁNSGRUNNINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Frágreiðingin um alternativa bústaðarbygging kom í tingið í gjár. Eitt av mongu umrøddu evnunum var framtíðin hjá Húsalánsgrunninum. Landsstýrismaðurin ætlar at nýta ein endurskipaðan Húsalánsgrunn til at fíggja alternativari bústaðarbygging, men serliga Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin góvu til kennar, at tað vóru flokkarnir ikki so fegnir um*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í tinginum í gjár legði landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, fram frágreiðingina til aðalorðaskiftið um alternativa bústaðarbygging. Ein arbeiðsbólkur við embætisfólkum úr Familu- og Heilsumálaráðnum og Fíggjarmálarráðnum fór undir arbeiðið at orða eitt uppskot um alternativa bústaðarbygging í oktober mánaði 2002, og í apríl mánaði í ár kom bólkurin á mál við sínum arbeiði.

Frágreiðingin er rúgvumikil, og arbeiðsbólkurin er komin fram fleiri hugvekjandi niðurstøður. Ein teirra er, at Húslánsgrunnurin skal í framtíðini gerast nógv virknari fíggingarstovnur til bústaðarbygging.

Eftir orðaskiftið í tinginum í gjár at døma, so bendir nógv á, at júst hetta mál, sum um fer at elva til miklan orðadráttur í framtíðini.

## Ótíðarhóskandi

Arbeiðsbólkurin sigur í frágreiðingini, at tíðin er farin frá upprunaligu endamálunum við Húsalánsgrunninum. Lógin um Húsalánsgrunnin hóskar ikki til bústaðartørvin í dag, og tí er neyðugt, at hon verður nútímansgjørd.

Bólkurin vísir á, at neyðugt er við einum almennum bústaðarpolitiskum amboðið, tí marknaðarkreftirnar megna ikki einsamallar at taka uppgávuna á seg. Mett verður, at peningastovnar taka ikki bústaðarpolitisk atlit í sambandi við bústaðarfígging, men at fremsta uppgávan hjá privatu peningastovnunum er at skapa størst møguligan vinning

Bólkurin er tí sannførdur um, at besta bústaðarpolitiska amboðið hjá landsmyndugleikunum er ein endurskipaður Húsalánsgrunnur, ið verður skipaður við einum nýggjum lógar- og regluverki.

## Trý tilmæli

Arbeiðsbólkurin vil kortini ikki leggja seg út í, hvussu endurskoðaði Húsalánsgrunnurin skal skipast, tí tað er ein politiskur spurningur. Kortini hevur bólkurin trý tilmæli. Bólkurin metir, at tað er nærliggjandi at kanna møguleikarnar fyri einum almennum partafelag, einum vinnurekandi grunni og einum landsstovni.

Ein møguleiki er at skipa Húsalánsgrunnin sum alment partafelag, eins og partafelagið Føroya Tele í 1997, har landið eigur allan partapeningin. Ein annar møguleiki er, at Húsalánsgrunnurin gert ein vinnurekandi grunnur. Verður Húsalánsgrunnurin skipaður sum ein vinnurekandi grunnur, játtar Løgtingið stovnsfæið, men eigur hereftir einki í grunninum.

Triðji møguleikin er landsstovnur, har Húsalánsgrunnurin árliga verður bæði á løgtingsfíggjarlógina og í landsroknskapin

## Halda seg burtur

Framsøgmaðurin hjá Sambandsflokkinum undir aðalorðaskiftinum í gjár, Alfred Olsen, var helt lítið um, at tað almenna við einum endurskipaðum Húsalánsgrunnin fer upp í kappingina við peningastovnarnar at veita fígging til bústaðarbygging. Hann helt, at privatu peningarstovnarnir høvdu ovmikið av peningi at læna, og tískil kundi stórt spurnartekin setast við, um tað almenna skuldi upp í kappingina.

– Sambandsflokkurin vil vera við til at verandi privat áhugamál verða varðveitt, meðan tað almenna skal halda seg til at taka sær av teimum sjúku og veiku í samfelagnum, segði Alfred Olsen í tinginum

Hann legði dent á, at flokkurin ikki tók undir við, at Húsalánsgrunnurin verður politiskt stýringsamboð, ið skal stuðla alternativari bústaðarbygging. Fíggingin skal verða á einum fríum marknaði, har privatu fíggingarstovnarnir framhaldandi kappast í fríari kapping, segði hann.

## Ein kastibløka

Framsøgumaðurin hjá Fólkaflokkinum í bústaðarmálum, Jørgen Niclasen, helt fyri, at tíðin nú var búgvin til at geva Húsalánsgrunninum eitt veruligt tilverugrundarlag. Grunnurin hevði leingi verið ein politisk kastibløka, og nú mátti okkurt gerast. Framsøgumaður Fólkafloksins róð framundir, at Húsalánsgrunnurin átti at verið rikin á vinnuligum fortreytum, sum kappast við aðrar stovnar á jøvnum føti.

– Húsalánsgrunnurin átti at verið rikin sum eitt slag av banka, ið varð latið privatum at reka. Tað hevði havt við sær størri kapping, og harvið betraðar møguleikar. Ein møgulig søla av Húsalánsgrunninum kundi eisini verið við til at goldið nakað av skuldini hjá tí almenna, segði Jørgen Niclasen.

Hann tók undir við peningastovnunum, ið hava víst á í fjølmiðlunum, at teir meta, at eitt alment felag, ið fíggjar bústaðarbygging, er kappingaravlagandi hjá privatu vinnuni. Jørgen Niclasen greiddi frá, at tað var kappingavlagandi báðar vegir.

Húsalánsgrunnurin fór at verða betri fyri í kappingini mótvegis peningarstovnunum, tá talan var um alternativa bygging, men verri, tá talan var um vanliga sethúsabygging, tí grunninum var álagt serliga skyldur mótvegis alternativari bygging. Spurningurin kundi tí stórliga setast við, um ætlanin hjá landsstýrismanninum var røtt, vísti fólkaflokstingmaðurin á.



*- Húsalánsgrunnurin átti at verið rikin sum eitt slag av banka, ið varð latið privatum at reka. Tað hevði havt við sær størri kapping, og harvið betraðar møguleikar. Ein møgulig søla av Húsalánsgrunninum kundi eisini verið við til at goldið nakað av skuldini hjá tí almenna, segði Jørgen Niclasen millum annað undir aðalorðaskiftinum um alternativa bústaðarbygging*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Væntandi svørsslag

Landsstýrismaðurin í bústaðarmálum, Bill Justinussen, segði í Útvarpi Føroya í gjár, at ein endurskoðaður Húsalánsgrunnur er eitt gott amboð til at veita lagari fígging til alternativa bygging, enn peningastovnarnir kunnu veita í dag.

Hann bar seg eitt sindur undan, tá hann varð spurdur um samgongan er samd um ætlanirnar at endurskipa Húsalánsgrunnin sum almennur fíggingarstovnur, og segði, at landsstýrið ikki hevði kjakast um smálutirnar í frágreiðing. Hann kendi kortini á sær, at hann stuðul til tey yvirskipaðu málini við frágreiðingini.

Bill Justínussen segði seg vænta, at lógarbroytingarnar við Húsalánsgrunninum verða lagdar fram tíðliga í hesi tingsetuni.

Eftir orðaskiftinum at døma, bendir nógv á, at tað verður ikki uttan eitt svørsslag við kanska serliga Fólkaflokkin at Húsalánsgrunnurin verður endurskipaður, sum mælt verður til í frágreiðingini. Tingmenn hjá Fólkaflokkinum góvu til kennar, at teir vóru alt annað enn fegnir um ætlanina við einum virknum almennum fíggingarstovni til bústaðarbygging.



# Ferðsluforðingar í Klaksvík

**Klaksvíkar kommuna er nú í ferð við at seta upp nakrar ferðsluforðingar eftir strekkinum undir Hálsi og undir Klakki. Karl Heri Joensen, formaður í Ferðslunevndini hjá Klaksvíkar kommunu, sigur, at ferðsluforðingar er nakað, sum fer at verða meira og meira at síggja til í Klaksvík framyvir**

VEGFORÐING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



**Klaksvík:**
Talan er um níggju ferðsluforðingar, sum skulu hava umleið 150 metrar ímillum. Karl Heri sigur, at orsøkin til at kommunan júst hevur valt hetta økið, sum tað fyrsta við ferðsluforðingum er, at hetta er eitt so at siga nýbygt øki, har nógvar barnafamiljur búgva. Nógv børn síggjast dagliga úti á hesum strekkinum. Harumframt sigur Karl Heri, at av tí at strekkið er so langt og beint, so letur tað til, at bilførarar ótilvitað trýsta harðari á spitarin fyri at koma skjótari fram. Og tað er ikki vandaleyst í einum barnaumhvørvi. Men nú hevur Klaksvíkar kommuna so tikið um endan á trupulleikanum og er farin í gongd við at seta ferðsluforðingar upp fyri at betra um trygdina á veganetinum í býnum. Ferðsluforðingarnar á hesum vegastrekkinum eru úrslit av viðgerðum í Teknisku og Ferðslunevndini í Klaksvíkar kommunu. Karl Heri viðgongur eisini, at áheitanir eru komnar frá fólki, men hann sigur, at tað er fyrst og fremst ein avgerð hjá kommununi, sum er orsøkin til, at ferðsluforðingarnar nú koma upp.

– Hesar ferðsluforðingarnar eru ikki so ógvusligar, men tær eru nóg mikið til at tálma ferðsluni, sigur Karl Heri, og hann leggur afturat, at strekkið verður skeltað við 40 km/t sum mest loyvda ferð.

## Fleiri forðingar

Karl Heri sigur, at ferðsluforðingar fara at koma upp aðrastaðni í býnum og í Árnafirði um stutta tíð. Eitt nú verða nýggjar ferðsluforðingar setta upp aftur á Mylnugøtu. Har vóru tvær, men tær vórðu tiknar burtur aftur herfyri, tí tær vóru so høgar, at tær heldur tarnaðu ferðsluni enn at tálma henni. Tær, sum so fara at koma uppaftur, verða meira líka teimum, sum nú verða gjørdar undir Hálsi og Klakki.

– Í løtuni er ongin avgerð tikin um, hvar aðrastaðni í býnum hesar ferðsluforðingarnar fara at koma, men vit fara at síggja meira og meira til tær, sigur formaðurin í Ferðslunevndini.

# Evnisdagur um almannalóggávu í Norðanlondum

**Tann 10. november skipar Almannaráðið fyri einum evnisdegi í Norðurlandahúsinum , har ljóskastarin verður settur á almannalóggávu í Norðanlondum**

EVNISDAGUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Á evnisdegnum verður kunnað um, hvussu almannalóggávan í teimum ymisku Norðurlondunum verður umsitin og fíggjað, og nortið verður herundir við innihaldið av hesum veitingum.

Evnisdagurin snýr seg um eitt nú brekaðøkið, dagpening, pensjónir, barna- og familjuveitingar og arbeiðsskaðatrygging. Hetta eru øki, sum í Føroyum hoyra undir landsstýrismannin í almannamálum. Harumframt snýr evnisdagurin seg um øki, sum her heima hoyra til onnur málsøki, til dømis arbeiðsloysistrygging, barsilsskipan, sjúkratrygging, primera og sekundera heilsusektorin og heilivág.

## Norðurlendskir undirvísarar

Á evnisdegnum undirvísa Jan-Åke Brorsson úr Svøríki, og Liv Winding-Sørensen úr Noregi. Jan-Åke Brorsson er útbúgvin samfelags- og búskaparfrøðingur, og starvast sum búskaparstjóri í tí svenska Försäkringskasseförbundet. Harumframt hevur hann í nógv ár verið virkin í norðurlendskum samstarvi, m.a. við at halda skeið um almannalóggávu.

Liv Winding Sørensen er serfrøðingur á pensjónsøkinum og hevur arbeitt við almannaveitingum í norska Rikstrygdeverket í nógv ár. Eisini hon hevur drúgvar royndir í norðurlendskum samstarvi, umframt í at halda skeið um pensjónsøkið og familjuveitingar í Norðanlondum.

Evnisdagurin byrjar við, at landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu setur dagin. Síðani hava undirvísararnir báðir tveir fyrilestrar í part. Ein í part fyrrapart og ein seinnapartin.

Dagurin byrjar klokkan níggju og endar um hálvgum fimm tíðina seinnapartin.

# Altjóða ST dagur

Fríggjadagin er altjóða ST dagur. Dagurin verður hátíðarhildin á ymsan hátt kring allan heimin

Og føroyska ST felagið hevur sent út eitt opið bræv, har tey nýta høvi til at minna á, at fríggjadagurin 24. oktober er altjóða ST dagur. Dagurin er kosin av heimssamfelagnum at hátíðarhalda, at Sameindu Tjóðir varð sett á stovn.

Dagurin verður hátíðarhildin á ymsan hátt – ofta við tiltøkum, ið lýsa, hvat ST er, hví tað varð sett á stovn, hvat endamálið hjá stovninum er og so framvegis.

Føroyska ST felagið heitir í brævi sínum á bæði fjølmiðlar og skúlar um at luttaka í hesum hátíðarhaldinum.

**-sae-**

TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnets-telefonfelagar í Føroyum.

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

Hvítu síður

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

Gulu síður

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | |
|---|---|
| (A)+(D) Standardlýsing ........................ | kr. 650,00 |
| (B) Stórt navn ........................ | kr. 50,00 |
| (C) Innramming ........................ | kr. 100,00 |
| (E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. | kr. 25,00 |

(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*
**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**